# Nýggjar Transit útgávur

**Fyrst í 2008 kemur ein dagførd útgáva av Ford Transit á marknaðin. Umframt ein nýggjan 3,2 litra Duratorq TDCi commonrail dieselmotor og smærri designbroytingar kemur eisini sportliga útgávan Transit SportVan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Við nýggjum Duratorq TDCi motori við 200 hk, betri lastievni og betri koyrieginleikum, saman við útgerð sum t.d. ESP (Elektronic Stability Program) og HLA (Hillholder) er Ford Transit klárur til at taka dystin upp í hørðu kappingini millum vørubilarnar á marknaðinum.

3,2 litra Duratorq TDCi commonrail dieselmotorurin við fimm sylindarum og 200 hk hevur eitt snúningsmoment upp á 470 Nm frá 1700 til 2500 snún./min. Eisini 6-trins Durashift girkassin er dagførdur og tilpassaður nýggja motorinum.

Umframt 3,2 litra motorin fæst Ford Transit við 2,4 liter Duratorq TDCi dieselmotorum frá 85 til 140 hk. Transit skal vera bíligur at halda við líka. 50.000 km ella tvey ár millum eftirlitini er ikki so lítið. Mest eyðsýnligu broytingarnar við nýggja Transit eru t.d. nýggir kúfangarar og nýtt kølaragittar.



*Transit SportVan er ein sportlig útgáva av nýggja Ford Transit*

### Transit SportVan

Transit SportVan er ein sportlig útgáva av Ford Transit við 2,2 litra Duratorq TDCi dieselmotori við 140 hk og snúningsmomenti upp á 350 Nm, eins og 6-trins gearkassa. Transit SportVan er eyðkendur av t.d. stylingsetti og 18" lættmetallfelgum við 235/45 dekkum.

Ford Transit, sum hevur verið á marknaðinum síðan 1965, er ein av mest fjølbroyttu vørubilum á marknaðinum. Teir fáast í meira enn 200 ymiskum útgávum og støddum.

Nýggi Ford Transit kemur á marknaðin fyrst í 2008.


*Fyrst í 2008 kemur ein dagførd útgáva av Ford Transit á marknaðin*


*Ford Taunus Transit frá 1953*


*Ford Transit frá 1965*


*Ford Transit bussur. Hesir eru ikki ókendir sum rutubilar í Føroyum*